Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

fyrispurning nr. 49/2019 frá Heðini Mortensen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum við umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, um avgerð um farloyvi hjá kommunustýrislimum (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Spurningurin var soljóðandi:

1. Var tað ein politisk avgerð, nú siðvenjan viðvíkjandi farloyvi hjá kommunustýrislimi brádliga varð broytt beint fyri jól?
2. Kann landsstýrismaðurin greiða frá løgfrøðiligu grundgevingunum fyri hesi kúvending?
3. Metir landsstýrismaðurin, at starvið sum kommunustýrislimur bara er ein framíhjárættur, sum hvør einstakur kommunustýrislimur kann velja at røkja ella ikki at røkja?
4. Um so er, metir landsstýrismaðurin hetta vera fremjandi fyri kommunustýrisarbeiðið og álitið á kommunustýrisarbeiðið?

Svar:

Til nr. 1
Stutt undan jólum vendi umsitingin í Tórshavnar kommunu sær til umsitingina í Umhvørvis- og vinnumálaráðnum við spurningi um, nær ein kommunustýrislimur hevur rætt/skyldu at taka sæti aftur í kommunustýrinum eftir fráveru. Tórshavnar kommuna vísti á, at siðvenjan í kommununi hevði verið, at tá ið tiltakslimur kemur inn fyri kommunustýrislim, so situr tiltakslimurin í minsta lagi í 14 dagar í sessinum, áðrenn kommunustýrislimurin aftur kann taka sæti í kommunustýrinum.

Svarið til kommununa var ikki politiskt, men eitt svar frá umsitingini í Umhvørvis- og vinnumálaráðnum upp á ein fyrispurning frá kommununi um, hvussu kommunustýrislógin skal skiljast.

Til nr. 2
Hugtakið at fara í farloyvi finst ikki í kommunustýrislógini. Hinvegin kemur tað fyri, at kommunustýrislimur ikki fær røkt starvið sum kommunustýrislimur, og tí hevur kommunustýrislógin ásetingar um, nær ein tiltakslimur tekur sæti í kommunustýrinum.

Valbærur persónur hevur skyldu at taka við vali, sbrt. kommunuvallógini § 22, stk. 3, og kommunustýrislimur hevur skyldu at røkja starvið í valskeiðinum. Kommunustýrislimur hevur sum meginregla eisini skyldu til at vera á kommunustýrisfundum og á teimum nevndarfundum, har hann er valdur sum nevndarlimur. Møtiskyldan er tó ikki treytaleys, og eftir lógini skulu serligar orsøkir til fyri at kalla inn tiltakslimir. Eftir kommunustýrislógini eru ávís føri, har tiltakslimur skal verða kallaður inn og onnur føri, har tiltakslimur kann verða kallaður inn.

Tiltakslimur **kann** verða kallaður inn, um kommunustýrislimur ikki kann møta vegna heilsustøðu, um kommunustýrislimur er ógegnigur og við aðru viðgerð av fíggjarætlanini.

Berst komunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, **skal** tiltakslimur verða kallaður inn. Borgarstjórin hevur sostatt skyldu til at kalla tiltakslim inn, tá fráveran er grundað á nevndu orsakir, og tá talan er um fráveru, sum væntandi verður longri enn 14 dagar. Um fráveran væntandi er styttri enn 14 dagar, hevur borgarstjórin ikki skyldu til at kalla tiltakslim inn, uttan so at kommunustýrislimur fær forfall vegna heilsustøðu og limirnir á viðkomandi valevnalista krevja, at tiltakslimur fær fundarboð ella um talan er um fyrsta fundin í býráðnum, har kommunustýrið skipar seg. Við aðru viðgerð av fíggjarætlanini kunnu limirnir á viðkomandi valevnalista eisini krevja, at tiltakslimur fær fundarboð, óansæð hvør orsøkin til forfallið er.

Tað er kommunustýrið, sum ger av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Um tað vísir seg, at fráveran er styttri enn væntað, so kann kommunustýrislimur taka upp aftur sítt starv sum kommunustýrislimur, hóast fráveran er styttri enn 14 dagar. Grundgevingarnar fyri hesum eru:

- At kommunustýrislógin § 19, stk. 1, ásetur, at *tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri at luttaka, fer innkomin tiltakslimur út,*
- at teir persónar, sum eru valdir í kommunustýrið eru fólkavaldir og hava tískil rætt at sita í kommunustýrinum framum tiltakslimir,
- at í førum, tá ið ein tiltakslimur kemur inn í eitt styttri tíðarskeið enn 14 dagar, grundað á at ein kommunustýrislimur hevur forfall vegna heilsustøðu, so fer tiltakslimurin út aftur, so skjótt kommunustýrislimurin aftur er førur fyri at røkja starvið. Her er einki krav um at tiltakslimurin skal sita í kommunustýrinum í minsta lagi 14 dagar.

Fyrimyndin fyri føroysku kommunustýrislógina er tann danska kommunustýrislógin. Í donsku lógini § 15, stk. 3, er ásett, at *når medlemmet på ny kan varetage sine kommunale hverv, udtræder stedfortræderen af kommunalbestyrelsen*. Viðmerkingarnar til ásetingina siga, at tiltakslimurin fer út, tá tann valdi aftur kann røkja starvið sum kommunustýrislimur, eisini um forðingin hjá tí valda er styttri enn væntað. Hendan tulkingin í Danmark stuðlar uppundir tulkingina omanfyri.

Til nr. 3 og 4

Víst verður til svar upp á spurning nr. 2, har greitt verður frá, at starvið sum kommunustýrislimur er at meta sum borgaraskylda, og at kommunustýrislimir sum meginregla hava skyldu til at røkja starvið.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 3. februar 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður